# WWW.Olivant.fo, eitt gott mið...

*HEIMASÍÐU UMMÆLI:*

**Eitt eyðkenni við kunningartøknini er at alt verður flutt inn á telduskýggjan. Í staðin fyri at nýta fløgur, sjónvarp, telefon ella hvat tað nú skal vera, verður teldan sett sum miðdepil fyri øllum hentleikum. Hetta verður á fremmanda máli neynt integratión.**

**Á nýggja motorvegnum er tað teldan ið er hjarta í húsarhaldinum, har seinasta fyribrygdi á økinum er at flyta útróðurin inn á alnótina. Vit siga at vit rógva út á internetinum, ella surfa sum onnur taka til. Eitt mið á hesi nýggju leið er WWW.Olivant.fo ið vit her fara at royna.**

Tey sum vanliga nýta alnótina, hava seinastu dagarnar lagt til merkis, at heimasíðan hjá Føroya Tele hevur skift ham. Hetta er í samband við at liðin eru 4 ár síðan internetævintýrið byrjaði í Føroyum. At hendan síðan ikki kann halda føðingardag aftur fyrr enn um 4 ár, kemst av at valið hjá Føroya Tele at leggja til brots við alnótuveiting fall á sjálvan 29. februar.

Eitt av endamálunum hjá hesi heimasíðu er óiva at geva brúkaranum eina gongda leið inn á alnótina. Hetta mið hevur sjálvsagt tann fyrimun, at vit kunnu royna okkum gjøgnum eina føroyska slóð. Eisini er hetta rætta staðið at byrja, um vit ynskja at leita eftir føroyskum tilfari á internetinum.

**Men hvussu langt røkkur Olivant, og hvørjar avmarkingar hevur hendan leiðin?**

Fyri tað fyrsta eru tað ongar náttúrligar avmarkingar sum so, tí allar hurðar standa opnar. Tó er ein vansi við alnótini, at ein skjótt villist, og tað er júst hetta tey sonevndu evnisyvirlitini skulu nýtast til.

Fyri uttan at vera almennur veitari av alnótini í Føroyum, hevur Føroya Tele heilt tilvitað lagt seg eftir at leiða okkum inn á nótina á ein tryggan hátt. Hetta verður millum annað gjørt við at bjóða nakrar slóðir, ið eru býttar upp í evni — also eitt evnisyvirlit. Vit mugu siga, at hetta er gjørt við umhugsni, og uttan at troðka burtur hugsaninar um at alt kann gerast betur, hevur tú eina kenslu av at valið er gjørt við følarum úti millum fólk.

Um vit ímynda okkum at tað er okkurt serøki, ið hevur eins áhuga, ber skjótt til at nema sær nærri kunnleika um evnið, ella lesa seinastu tíðindini á økinum, við at nýta evnisyvirlitið hjá Olivant. Hetta við tí føroyska verður tó ikki nakað vit kunnu halda okkum til, tí tað er sum kunnugt sera smátt við føroyskum útbjóðarum á nótini í alheimshøpi.

Um tú á hin bógvin vilt frætta nýggjastu heimatíðindini, ber til gjøgnum Olivant, á ein skjótan og greiðan hátt, at finna allar føroyskar heimasíður.

Fyri at venda aftur til evnisyvirlitið á Olivant, so eru tað 4 høvðusevni at velja ímillum, hesi eru:

- **Tænastur**, har internet tænastur, forrit, web hotel og annað hent er at finna.

- **Heimasíður**, ið er ein leitari til tær føroysku heimasíðurnar. Hesar eru býttar upp í *vinnuligar heimasíður*, *privatar heimasíður, skúlar, feløg, stovnar* og *virki*. Harafturat eru onnur evni at finna, eitt nú *bløð* og *tíðarrit, ferðing, útbúgving, barnasíðan* og *kvinnusíðan*.




- **Leiðbeining**, har prísir, umsóknarbløð og aðrir upplýsningar frá Føroya Tele eru at finna.

- **Teknikkur**, har ymiskt um sjálva alnótina er at finna, eitt nú FAQ (títtir spurningar) og hagtøl um alnótina sum heild.

Eisini finna vit eina rúgvu av bannarum á heimasíðuni hjá Olivant. Fleiri av hesum eru óiva stuðlar hjá síðuni. Millum hesar er sjálvsagt eisini **www.nummar.fo** ið er avloysarin hjá nummarkall ella telefonbókini fyri tey ið hava atgongd til alnótina. Eisini finna vit, eitt nú, Jolly Chat, ið er sera nógv umrøtt av teimum yngru nýtarunum.

Eisini finst ein netleitari á síðuni, ið sera praktiskt er nevndur *Olivant Leitarin*. Á nevnda leitara ber til at finna ymsar adressur og annað á ein skjótan hátt. Hetta verður ofta kallað *Fast Finder* ella *Quick Search* á enskum máli.

Fyri uttan nevnda Olivant Leitaran, finst eisini ein innanhýsis (ella skuldu vit sagt innansíðis) leitari, har tað ber til at leita á síðunum hjá Føroya Tele.

Seinast, men ikki minst, finst ein beinleiðis slóð til DMI, ið er danska veðurtænastan. Har ber til at finna upplýsningar um veðrið. Nevnast kann at hetta er sama kelda sum Útvarpsrásirnar í Føroyum nýta. Slóðin til DMI finst undir eini ímynd (ikon) ið nevnist Veðurtíðindi.

**Niðurstøða**

Aftaná at hava roynt síðuna eitt sindur nærri, herundir slóðirnar og tænasturnar, má ásannast, at síðan er hent og eitt gott mið á alnótarvegnum. Eitt sum kanska telur eitt sindur niður, uttan at Føroya Tele kann gera nakað við tað sum so, er at ein sjálvsagt kann og eigur at krevja meira av hesi heimasíðu enn øðrum føroyskum heimasíðum. Fyri tað fyrsta, tí Olivant og harvið Føroya Tele stendur sum einasti núverðandi útbjóðari av internet tænastu í landinum, og harafturat er tað ongin í landinum, ið hevur nýtt so nógva orku, sum Føroya Tele, fyri at blíva hollari innan alnótina og nýtsluna av henni.

Um *lay-out*, kunnu vit siga, at tað var í tøkum tíma at Føroya Tele fekk skift tann "bláa" skíggjan út við eina meira professionella skipan. "Gamla" heimasíðan hjá Olivant var snøgt sagt ótíðarhóskandi, og afturútsigld við nógvum fjóringum.

Ætlanin er, her á síðuni, at vit í framtíðini fara at líta at øðrum heimasíðum, og út frá hesum geva okkara egnu viðmerkingar og ummæli. Tey ummæli ið vera givin her, eru sjálvsagt okkara egna meting, og má tí standa fyri okkara egnu rokning.

Alt tikið við, meta vit at heimasíðan hjá Olivant eigur 4 av seks stjørnum uppiborið, út frá hesum:

**Ummæli av www. olivant.fo:**

| | |
|---|---|
| Tøknikkur: | **** |
| Stílur/snið: | *** |
| Hentleikar: | ***** |
| Møguleikar: | **** |
| Lætt at nýta: | **** |
| Skjótleiki: | **** |
| **Samanlagt**: | **** |

Næstu ferð er ætlanin at hyggja eitt sindur nærri eftir KT-Deplinum, ið liggur undir adressuni, **www.skular.fo** Hetta er ivaleyst mest nýtta heimasíðan av teimum ungu í dag, í sambandi við at allir næmingar í fólkaskúlanum og miðnámsskúlunum hava fingið ókeypis e-post adressu gjøgnum hesa síðu. Tað er Undirvísingar og Mentamálastýrið ið stendur fyri verkætlanini.

**Skrivað:**
**Finn Jensen**
**finn@sosialurin.fo**

**Soleiðis leggur tú Olivant sum byrjunarsíðu á heimatelduna**

1. Klikk á ímyndina fyri ***denne computer*** á skrivaraborðinum.
2. Klikk á ***Kontrolpanel***.
3. Vel ímyndina fyri ***Internet***.
4. Undir ***Generelt***, ***adresse***, skrivar tú: **http://www.olivant.fo**
5. Klikk á **OK**!

Næstu ferð tú fer inn á *Internet explorer* kemur heimasíðan hjá Olivant á skýggjan.

## Káta Hornið

**Elsta starv**

Ein lækni, ein verkfrøðingur og ein teldurágevari sótu og tjakaðust um hvat varð elsta starv á jørð. Læknin segði "Jú, í Bíbliuni stendur skriva at Guð skapti Evu við einum rivjabeini, sum hann tók frá manninum. Tað sigur seg sjálvt at hetta hevur kravt eina skurðviðgerð og tí er læknastarvið tað elsta". "Halt uppat", segði verkfrøðingurin. "Áðrenn tað hendi, nevnliga í byrjanini av Bíblinum, stendur, at Guð skabti himmalin og jørðina burtur úr øllum ruðuleikanum, so tygum taka feil kæri lækni. Mítt starv er tað elsta!" Teldurágevarin setti seg aftur á og segði brasin "Hattar ljóðar alt gott hjá tykkum báðum, men hvør halda tit skapti ruðuleikan ?"

**ORÐALISTI**

Orð ið eru nýtt í K.T.Horninum í dag og frammeftir:

| | |
|---|---|
| **Evnisyvirlit** | Emneregister |
| **Fílaflutningur/fílaveiting** | Filoverførsel |
| **Heimsnet** | World Wide Web |
| **Heimstaður/heimaøki** | Domæne |
| **Ímynd** | Ikon |
| **Kervi** | Netværk |
| **Kjaksíður** | Diskussionsgrupper |
| **Leitibúnaður** | Browser |
| **Leitimaskina/Netleitari** | Søgemaskine |
| **Ravtøkni** | Elektronikkur |
| **Ritbúnaður** | Software |
| **Tíðindasíður** | Nyhedsgrupper |
| **Tólbúnaður** | Hardware |

## Topp - 10 listin

**Mest vitjaðu føroysku heimasíðurnar**

| Hesa vikuna | Síðstu viku | Vikur á listanum | Síðunavn |
|---|---|---|---|
| 1 | 1 | 2 | Magnus Sørensen |
| 2 | 2 | 7 | Jógvan Heinesen |
| 3 | 3 | 3 | Faroese Chat |
| 4 | 4 | 9 | Tíðindablaði Sosialurin |
| 5 | 6 | 2 | Føroya Javnaðarflokkur |
| 6 | 5 | 9 | Dimmalætting |
| 7 | 7 | 2 | Leitel Tíðindi |
| 8 | 8 | 7 | Leitel Chat |
| 9 | 10 | 2 | NSÍ |
| 10 | 9 | 2 | B36 |

Kelda: *www.leitel.fo*

REPROZ
GRAFISKAR LOYSNIR
Tel +298 31 95 40
Fax +298 31 75 41
Alt innan prentlutir
Mail: jakzac@post.olivant.fo

sam-teld



**HEIMARØKTIN**
**Sigmundargøta 5 · Tlf. 317240 · Fax 319238**
**100 Tórshavn**

## Summarfrítíðaravloysarar

Søkt verður eftir **avloysarum fyri heimasjúkrasystrar og heimahjálparar** frá 1. juni til 31. august 2000 ella eftir avtalu.

Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir saman við neyðugum skjølum skulu vera økisleiðarunum í hendi seinast 15. apríl 2000, og sendast til:**

**Øki 1. Suðurstreym**
Skálatrøð 14, Boks 1248, 110 Tórshavn
att: økisleiðari Anna Maria Oskarsson.

**Øki 2. Norðstreym/Vágoy**
Heilsumiðstøðin, 370 Miðvágur
att: økisleiðari Sonja Klein

**Øki 3. Eysturoy**
Heilsumiðstøðin, 620 Runavík
att: økisleiðari Ása Hanusson

**Øki 4. Norðuroyggjar**
Bøgøta 34, 700 Klaksvík
att: økisleiðari Elsba Lützen

**Øki 5. Suðuroy**
Heimarøktin, 900 Vágur
att: Jeanna á Lágabø

**Øki 6. Sandoy**
Áargarður, 210 Sandur
att: økisleiðari Ida Sørensen

**Heimarøktin**

**Hjá okkum fáast vognar og útgerð til allar flutningsuppgávur!**

- **Viðfestisvognar sum lasta frá 325 kg. upp til 2.600 kg. –nógv model!'**
- **Eykalutir til viðfestisvognar**
- **Sekkjavognar, hydr. lyftiborð –arbeiðsbord**
- **Vognar til gassfløskur, oljutunnur, kassar, trappir –óteljandi møguleikar!**
- **Gafflar til heisan av plattum, vøru o.a.**
- **Tip - Ruskkonteinarir til trukkar**
- **Spennireimar og lyftistroppar**
- **Sleipikrókar til øll bilmerki!**

*Tosið við okkum!*

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

**Nýggjar TANNPROTESUR**

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16

## Skrivstovustarv

Føroya Shell søkir starvsfólk til bókhaldið á høvuðsskrivstovuni í Tórshavn.

**Arbeiðið fevnir um:**
- Ábyrgd av ognarabókhaldinum
- Avgreiðslu av viðskiftafólki
- Kunna avloysa við EDV-skipanina
- Annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

**Vit vænta at tú hevur:**
- Útbúgving og royndir innan skrivstovuyrkið
- Royndir innan ognarabókhald
- Hollan kunnleika til EDV og at tær dámar at samskifta við onnur.

**Vit kunnu bjóða:**
- Eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv við avbjóðingum
- Møguleikar fyri útbúgving og persónligari menning
- Góða løn í samsvar við útbúgving og royndir.

Hevur tú hug at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja á telefon 34 74 00 lokal 213.

Umsókn við møguligum prógvum og viðmælum kann sendast til P/F Føroya Shell, Postbox 188, 110 Tórshavn og má vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 27. mars 2000.

**Shell**

STARV sosialurin

sosialurin sosialurin

## Grafikari til Sosialin

Søkt verður eftir grafikara til Sosialin at byrja 1. apríl ella skjótast tilber.

Umsøkjarar við grafiskari útbúgving og royndum innan blaðumbróting hava fyrimun.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Prentarafelag og Føroya Prentsmiðjufelag.

Umsókn, merkt grafikari, verður at senda til:

Sosialurin, box 76,
110 Tórshavn

Í seinasta lagi 20. mars.

*Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sosialin 311820 og spyrja eftir Torkil Johannesen.*

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Har starvast í dag umleið 25 fólk. Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna. Á prentsmiðjuni, sum er partur av fyritøkuni, verða umframt Sosialin eisini prentað onnur bløð. Sosialurin umsetti í fjør fyri uml. 10 milliónir krónur. Á grafisku deildini starvast 7 fólk harav 2 lærlingar. Deildin er útgjørd við teimum mest framkomnu teldunum og forritunum innan tað grafiska.

*P/F* ***THOR***
**Søkt verður eftir**
## maskinmeistara/ motorpassara
**til eitt av skipum okkara**

**Starvið:**
Er eitt avloysara starv, men møguleiki er fyri føstum starvi.

**Krøv og ábyrgd:**
Viðkomandi kemur at hava ábyrgd av, at formligu reglur á økinum, verða fylgdar, og at arbeiðsgongdir eru í tráð við málsetningin hjá fyritøkuni.

**Førleikakrøv:**
- Vinnubræv sum maskimeistari/motorpassari
- Heilsuprógv, ikki eldri enn 2 ár
- Trygdarskeið (ikki treyt, men fyrimunur)
- Roykkavara/sløkki skeið (ikki treyt, men fyrimunur)

**Løn og setanartreytir:**
Verður sett eftir avtalu.

Um hetta hevur tín áhuga ella um tú hevur spurningar hesum viðvíkjandi, vinarliga set teg í samband við okkum á tlf. 422503, ella skrivliga til felagið.

Umsóknin skal vera okkum í hendi skjótast tilber ella í seinasta lagi 24.03.2000.

**P/F THOR**
420 Hósvík • www.thor.fo

P/f Thor er eitt partafelag, sum rekur 6 skip, 3 av teimum eru í løtuni í Off-shore vinnuni og 3 í fiskivinnuni.

**PENSIONISTASKEIÐ Á HOTEL NORÐ**



*Um nóg góð undirtøka verður, er ætlanin at hava* ***PENSIONISTASKEIÐ*** *vikuskiftið 31. mars - 02. apríl. Nærri fæst at vita við at venda sær til Hotel Norð. Møguleiki er at tekna seg á tel. 45 12 44 ella 45 10 93*

**Hotel Norð**
Tel. 451244 - Fax 451245 - FO 750 Viðareiði

Sosialurin - 311820




www.sosialurin.fo